






Brekdeildin er deild á Almannastovuni, sum veitir ráðgeving um alt landið og arbeiðir í tøttum samstarvi við økisdeildirnar, og við stuðulsskipanina fyri børn. Starvsøkið hjá deildini fevnir um ráðgeving til fólk við skerdum førleika og familjur teirra, viðgerð av umsóknum um stuðul og hjálpartiltøk og samstarv við aðrar stovnar, sum veita tænastur til fólk við breki og annað.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

# Almannastovan søkir ráðgeva til Brekdeildina

Vit sóknast eftir einum sosialráðgeva ella fólki við aðrari hóskandi útbúgving, sum hevur hug og evni at arbeiða við fólki, ið bera brek og familjum teirra.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur viðkomandi eftirútbúgving.

Vit ynskja at tú hevur góðan kunnleika til sosiallóggávu og almenna fyrisiting, royndir í sosialum arbeiði, evni og vilja at samstarva og arbeiða tvørfakligt, evni at arbeiða við heildarloysnum, evni at orða teg munnliga og skrivliga og góðan telduførleika.

Ráðgevin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum líggja í tíðini og framtíðini.

Starvið umfatar í høvuðsheitinum ráðgeving og vegleiðing til fólk, ið bera brek og familjur teirra, umframt samstarv við aðrar fakbólkar og áhugabólkar.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 20. november 2006, kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



W W W . S O S I A L U R I N . F O

Lesið Sosialin -so eru tit við!